
Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum selur burturav bretsku loyvunum

**Jógvan Hugo Gardar**

01.08.2015 - 10:54

Oljan.fo

Atlantic Petroleum (AP) hevur gjørt avtalu við Third Energy Offshore um at selja ognarpartarnar hjá AP í trimum av loyvunum Pegasus west-økinum í bretskum sjógvi. Hetta boðar AP frá í einum boðum til íleggjararnar.

Atlantic Petroleum hevur átt ein ognarpart uppá tíggju present av hesum loyvunum, og tað er hetta sum Third Energy Offshore nú hevur keypt. Í fyrstu atløgu fær Atlantic Petroleum umleið 80 milliónir krónur fyri ognarpartarnar. Samlaði prísurin fyri søluna, um ávísar treytir eru uppfylgdar tá øki er liðugt útbygt, er góðar 175 milliónir krónur.

Stjórin í Atlantic Petroleum, Ben Arabo, sigur at tey eru nøgd við at avtalan er komin uppá pláss.

- Hetta styrir okkara fíggjarligu støðu í løtuni við lágum oljuprísum, samstundis sum tað prógvar virðini í okkara leitiloyvum, sigur Arabo.